

GRØNAR KEKS *Sagt verður, at Tjóðveldisflokkurin ætlaði at leggja avgjald á grønar keks. Hetta er púra rætt. Men flokkurin hevur samstundis slóðað fyri nøkrum av størstu sosialu framstigum nakrantíð. Hvat hevur størri týdning fyri teg - bíligar grønar keks ella sosialar ábøtur?*

# SOSIAL FRAMSTIG

Í seks ár hevur Tjóðveldisflokkurin havt fíggjarmál um hendi.
Hesi árini er skatturin hjá tí, sum vinnur 200.000 krónur, lækkaður við 10.000 krónum.
Fólkapensjónin er hækkað við 8.000 kr. fyri hjún og 12.000 kr. fyri støk.
Harumframt er pensjónin gjørd skattafrí. Barnafrádrátturin er hækkaður við 2.600 kr.
Lestrarstuðulin til heimabúgvandi er hækkaður við 8.000 krónum
og fyri útibúgvandi við 11.000 krónum.
Í knøpp tvey ár hevur Tjóðveldisflokkurin umsitið almannamál.
Hesa tíðina er m.a. farið undir at byggja ellis- og røktarheim til 123 fólk;
ein haldgóð loysn er funnin á barnaansinginі,
og pengar eru settir av til herberg fyri heimleys.
Tjóðveldisflokkurin hevur sett sær fyri,
at allur tørvurin á ellis- og røktarheimsplássum skal nøktast í samstarvi við kommunurnar,
at skipa nýggja, samhaldsfasta pensiónsskipan og at byggja út barsilsskipanina.

**Ein atkvøða** fyri Tjóðveldisflokkinum
er ein atkvøða fyri sosialari ábyrgd og samhaldsfesti.

E

TJÓÐVELDISFLOKKURIN

VEL FRAMTÍÐINA!

www.tjodveldi.fo




# DJ og karaoke

**Leygarkvøldið verður DJ-show og karaoke í Badmintonhøllini í Havn**

UNDIRHALD
*Tíðindaskriv*

Leygarkvøldið tann 10. januar verður DJ-show og karaoke í Badmintonhøllini í Havn. Nógv góð hit vóru frammi í árinum sum júst er farið afturum, og er hetta kvøldið fyrst og fremst ætlað til løg, sum hava verið frammi í 2003.

Eisini fáa tey sum hava hug høvi til at syngja Karaoke. Nakað sum eisini var sera væl mótitikið í fjør í samband við tær sokallaðu karaoke-kappingarnar. Men leygarkvøldið verður tað einamest fyri stuttleikar.

Tiltakið byrjar klokkan 23.30 og endar kl. 3.30 sunnunáttina. Bussar koyra aftur og fram, og longu nú ber til at bíleggja sær pláss á hesum.

# Randi vann hjá Elding

TÍÐINDASKRIV

Fyri jól hevði Elding eina av sonevndu gitu-kappingunum á skránni, har ein DVD-spælari og eitt sjónvarp kundi vinnast.

Í sýnisglugganum hevði elding sett eina stóra lykt av gamla slagnum, og varð hendan fylt við nøtum. So var tað upp til kundarnar at gita, hvussu nógvar nøtir vóru í lyktini.

Í alt vóru 585 nøtir í lyktini, og tað talið var tað eingin, sum gitti, men summi komu heilt nær.

Randi Arge úr Havn metti sjálv, at einar 580 nøtir vóru í lyktini, og hetta var nærmasta skotið, so tá allir seðlarnir vóru eftirhugdir, fekk hon at vita, at hon var hepni – ella skuldi man kanska sagt dugnaligi – vinnarin.

Mánakvøldið fekk hon so sjónliga prógvið fyri vinningin handað.





*Nýggja framtíð*
ella gamalt heimastýri?

**Valið stendur ímillum:**
Sjálvberandi búskap - ella bidda blokkstuðul
Frælsa vinnu - ella politiska studningsvinnu
Føroyskt sjálvræði - ella kollsiglt heimastýri

Jógvan Arge
Tjóðveldisflokkurin
XE

www.jogvanarge.com



# ÚTSØLA

NOA NOA® | TONE BARKER

ALT 1/2 PRÍSUR

Byrjar fríggjadagin
9. januar kl. 08.00

Opið er
til kl. 20.00

29 Í Tróndargøtu
tel 318200 • 218199

Sosialurin 341880